


Tlf. +298 347 200 · www.senta.fo

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# SAMSKIPARI
## innan leiðslu og kunning

**Søkt verður eftir samskipara innan leiðslu og kunning til stjóraskrivstovuna á Almannastovuni at byrja skjótast til ber. Á stjóraskrivstovuni eru tveir samskiparar, ið arbeiða tætt saman.**

*Umsóknarfreist: 7. des. 2007, kl. 9.*

Okkara ynski er, at tú hevur politiskt og fyriskipanarligt tev, ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið er skipað við beinleiðis tilvísing til stjóran, og samskiparin er, saman við hinum samskiparanum, við til at skipa arbeiðið.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið umfatar í høvuðsheitum samskipan av leiðsluuppgávum og fyrireikandi og uppfylgjandi uppgávur í sambandi við fundarvirksemi á leiðslustigi. Starvið umfatar eisini samskifti og samskipan/samstarv við stovnar undir Almannastovuni, aðrar almennar stovnar, feløg og áhugabólkar, uppgávur viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi, kunning og samskifti innanhýsis á stovninum eins og uttanhýsis, og viðvíkjandi myndugleikum og borgarum. Umframt hetta umfatar starvið eisini heimasíðu- og intranetrøkt, eins og aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur útbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi, hevur góðan kunnleika til kunningartøkni, kunnleika til almenna fyrisiting, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

**Løn og setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 353510, ella 215480.

**Umsókn**
Skrivligar umsóknir saman við avritum av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. desember 2007 kl. 9.00.

Umsóknirnar skulu sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20,
Postsmoga 3096, FO-110 Tórshavn.

KREA